# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eydna Skaale

Í MENNISKJUM GÓÐUR TOKKI

## INNSAVNING

Í dag, 5. november, fer stóra innsavningin »Í menniskjum góður tokki« av bakkastokki, og innsavningin heldur á inntil 11. desember. Endamálið er at savna pening til barnafamiljur í Føroyum, sum hava so mikið trong kor, at tey hava ilt við at klára jólini. Komandi mánaðin fara ymisk tiltøk at vera á skránni, og øll, sum leggja í, fáa góðar møguleikar at rætta næstanum eina hjálpandi hond. Tað er jú tað, jólini snúgva seg um. Stóra jólainnsavningin »Í menniskjum góður tokki« frá 5. november til 11. desember. Fyri øll allastaðni í landinum.

**Jólainnsavning**
Kring alt landið
5. november til 11. desember

## JESUS CHRIST SUPERSTAR




Eftir at hava vant í fleiri mánaðir, eru ungu fólkini handan sangleikin "Jesus Christ Superstar" klár til framførslurnar. Sølan av atgongumerkjum byrjaði 1. november og frumframførslan verður komandi fríggjadag 12.11 kl 19, og síðani verður spælt hvønn dag í vikuni kl 19.30. Sangleikurin er skrivaður av Tim Rice og Andrew Lloyd Webber og er nú eisini umsettur til føroyskt.

**Sangleikurin Jesus Christ Superstar**
hvønn dag í komandi viku kl 19.30
í Norðurlandahúsinum.
www.nlh.fo

## RØRSLA KANN FYRIBYRGJA SJÚKUM

Krabbameinsfelagið og Havnar Svimjifelag skipa fyri einum temadegi um rørslu og fyribyrging. Fokus verður sett á, hvussu rørsla kann vera týðandi táttur í at fyribyrgja krabbameini, hjarta- og æðrasjúkum, sukursjúku (typu 2 diabetes) umframt aðrar sjúkum. Á skránni verður ein fyrilestur við Bente Klarlund Pedersen, yvirlækna og professara. Hon hevur skrivað fleiri bøkur, millum teirra bókina "Motion på recept".

**Temadagur um rørslu og fyribyrging**
Hotel Føroyar
Fríggjdagin 5/11 kl. 13



## BON JOVI Í HAVNAR BIO

Mikudagin 10.11 verður ein serlig sýning í Havnar Bio. Talan er um konsertina »Bon Jovi - In concert from the New Giant Stadium 2010«. Konsertin varð filmað í mai í ár, tá Bon Jovi var á síni konsertferð nevnd »The circle tour«, sum var útseld. Konsertin var filmað í heimstatinum hjá Bon Jovi, New Jersey. Ynskir tú tær eina tónleikaliga uppliving á hvíta løriftinum, so fært tú hervið ein møguleika, tí konsertin verður bara sýnd einaferð! Einasta sýningin av Bon Jovi konsertini frá The new Giants Stadium 2010- mikukvøldið 10. november kl 20.00 í Havnar Bio.

**Havnar Bio**
mikukvøldið 10. november kl. 20.00



## PUB QUIZ

Ert tú vælvitandi og skjótur, tá tað ræður um at svara spurningum um almenna vitan? So kundi tað verið eitt gott hugskot at vitjað Café Chill í Kollafirði fríggjakvøld. Hetta til nýggjárs skipar Café Chill nevniliga fyri Pub Quiz hvørt fríggjakvøld kl 21.

**Pub Quiz**
Café Chill í Kollafirði
hvørt fríggjakvøld hetta til nýggjárs




## LIVERPOOL-CHELSEA

Sunnudagin 07.11 bresta Liverpool og Chelsea saman í Premier League uppgerð. Hóast tað á pappírinum ikki sær út til at boða frá spenningi, tá liðini á fyrsta og trettanda plássi hittast, so vænta tey flestu sær tó helst eitt brak av einum dysti.

**Liverpool-Chelsea**
Premier League
sunnudagin 07.11 kl 16



## SØLURÁSIN 2010 Á SKÁLA

Afturvendandi sølustevnan, sum Skála Ítróttarfelag skipar fyri, verður hetta vikuskiftið, 6. og 7. november, í høllini á Skála. Umframt tað, sum verður til keyps, verður nógv ymiskt undirhald á skránni, m.a. Angela og Hannibal, Jákup Veyhe, Eyðun og Terji, Hanus G. Johansen, Steintór og Kularrøtur og Trøllapætur.

**SøluRásin 2010**
í høllini á Skála
vikuskiftið 6. og 7. november.